## Semja millum øðrumegin Starvsmannafelagið og hinumegin Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**1.** Verandi sáttmálar verða framlongdir til tann 1. oktober í 2012. Lønir verða ikki broyttar.

**2.** Í sáttmálanum viðvíkjandi dagrøktarum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið verður § 15 stk. 2 orðað soleiðis: Samsýning fyri 5 gestarøktir í einum 8 viku tíðarskeiði er íroknað lønini hjá einum fulltíðarløntum dagrøktara. Treytin fyri allari gestarøkt er, at samlaða barnatalið ongantíð fer upp um 5 børn. Hevur dagrøktari 4 børn undir 3 ár í ansing, kann hesin bara taka 1 barn undir 3 ár í gestarøkt. Fyri parttíðarsettar dagrøktarar er tann sama regla galdandi, tó so at barnatalið ongantíð fer upp um 4 børn. Gjørt verður upp fyri 8 vikur í senn.

**3.** Í sáttmálanum fyri siglandi fólkið millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið verður gjørt hetta ískoyti: Reiðarin rindar fyri kravdar læknaváttanir.

**4.** Í sáttmálanum millum øðrumegin Starvsmannafelagið og hinumegin Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið verður sett inn:

A. Skrivstovufólk við yrkisútbúgving verða flokkað í lønarflokk 3.

B. Førleikaviðbót kann latast fyri eftirútbúgving. Hesar viðbøtir eru førleikaviðbøtur og eru knýttar at starvinum. Fyri at kunna fáa førleikaviðbót, skal útbúgvingin verða kravd og eftirútbúgvingin skal verða frá góðkendum útbúgvingarstað. Sjálvt um starvsfólk hava tikið meira enn eina eftirútbúgving, so verður bara ein viðbót latin. Er starvið parttíðarstarv, verður viðbótin samsvarandi setanarbrøkinum.

Eftirútbúgving 120 tímar: 750,-kr.
Eftirútbúgving 160 tímar: 1.000,-kr.
Eftirútbúgving 200 tímar: 1.250,-kr.

*Á Argjum tann 31. januar í 2012*

Starvsmannafelagið

Fíggjarmálaráðið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið